# fót á Asfalti

Mítt Asfalt: Dagfinn Olsen. Lærari, tónleikari, orða- og lagasmiður og blaðmaður. Teldupostur; dagfinn@sosialurin.fo. Hevur verið virkin partur av føroyska tónleikapallinum síðani fyrrapartin í áttatiárunum,verið á útgávum og sjálvur givið út, og hevur eisini skrivað nógv um tónleik.



*Asfalt savnaði ung sum eldri*



økinum. Hetta var gott, tí tað, at eini 2 ella kanska 3 tiltøk koyra í senn, er nokk. Meira skal tað ikki vera. Bæði tí áhoyrarin ikki fær møguleika at ganga ímillum og fáa eitt petti av hvørjari framførslu, um tað er tað ein vil, og eisini, tí tað annars verður ov lítð í part av áhoyrarum til allar pallarnar.

Blandið av nýggjum, ungum tónleiki og tónleikarum, og so tað kenda, etableraða og so nostalgiina, er sera góð. Har var okkurt fyri øll oyru fríggjakvøldið.

Tað løgna var kanska, at t.d. tá Simme og tey fóru á pallin, so vóru ikki nógv tilkomin fólk á økinum. Í hvussu er ikki tey, ið minnast fyrstu tíðina vð Simma og teimum.

Men Simme og tónleikarar - og tónleikur hansara - megnaðu sum onki at fáa miðaldrandi, ung og tey yngstu við.

Men hetta sigur tó nakað um, at føroyingar eru tungir at dansa við og ringir at fáa út undan væðingini og út á asfaltið.

Her krupu gamlir tónleikarar á pall og ungir undan væðingini í venjingarhølunum. Men (eldru) áhoyrararnir krupu ikki undan væðingini.

Og sum heild er at siga, at enn sum áður koma føroyingar ikki fyri seg, fyrr enn klokkan slær miðnátt.

Tað er spell, tí tá Asfalt byrjar klokkan 19 og túnini ikki fyllast fyrr enn á miðnátt, so sigur tað seg sjálvt, at alt ov mong ganga glipp av alt ov nógvum. Og tá tey hava sett sær fyri at fara og hava atgongumerki, so kunnu tey tað sama fara frá húsum í góðari tíð, og ikki beint innan tiltakið endar.

Men hetta er serføroyskt fyribrigdi.

Hinvegin kann tað vera, at fólk hava valt út, hvat tey vilja hoyra og møta til tíðina, tá hetta er at hoyra, men hesum ivist eg í.

## Íborið

Sum heild kann sigst, at breiða viftan av tónleikaútboðum lættliga kann fáa áhoyraran at missa luftina, um ein roynur fáa alt við. Hinvegin er áhoyrarin somikið at sær komin í dag, at hann dugir at velja. Og í einstøkum førum hevði tað við sær fríggjakvøldið, at nærum manntómt var framman fyri onkran pall, tí annað tilboð dróg áhoyrararnar.

Og sum orðatakið sigur; har gott fólk er, kemur gott fólk til. Og tað er íborið. Vit fylkjast í flokk og fara har fjøldin er. Helst tí vit vænta, at har er helst okkurt spennandi. At tað hinvegin kann loysa seg at leita og verða heppið at standa einsamallur við fonginum, kemur okkum sjáldan til hugs, og vit troyta ikki fjarleiðirnar, hóast har kann eisini verða okkurt at fáa, um enn so mong ikki royna har.

Fríggjakvøldið fór onkur góð framførsla fram fyri nærum tómum sali, tí glaðir tónar tættari gøtuni lokkaðu áhoyrararnar.

Asfalt er komið fyri at verða og er ein óførur møguleiki hjá teim ungu og ein góður pallur hjá teim royndu.

At fyrreikararnir tykjast hava opið sinni og ikki eru bangnir fyri at gera broytingar, er jaligt. Broytingarnar hesaferð gjørdu í øllum førum tiltakið betri.



*Tær dnasa á stóra pallinu á Asfalt*